# – Her liggur hon væl

**Norröna noyddist gjáramorgunin at leggja at við bryggju í Runavík. Hetta gekk sera væl, nú kommunan hevur lagað rampuna til hetta ferðamannaskipið**

SKIPAFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Ein sjáldsom sjón – Norröna við bryggju í Runavík. Men væl bar til at fáa bæði ferðafólk, bilar og farm í land*
*Mynd: Kenneth Rasmussen*

**Runavík:** Nú er tað prógvað enn einaferð: Norröna kann saktans leggja at í Runavík.

Hetta fekst fullgott prógv fyri fyrrapartin ígjár, tá Norrøna um áttatíðina kom skúmandi inn eftir Skálafjørðinum og legði at í Runavík.

Tað var nakað nógv av vindi á Havnini, so hildið var best at leggja at í Runavík ístaðin.

Her sluppu so øll tey 400 ferðafólkini – fleiri teirra ungdómar – í land, saman við teimum 100 bilunum og farminum. Tey 200, sum ikki vóru við bili, vórðu flutt víðari við bussum.

- Tað er altíð spennandi at fáa Norrönu á Runavík. Og eg haldi bara, at tað riggar sera væl at hava hana liggjandi herinni, verður sagt av havnarskrivstovuni í Runavík.

Seinnapartin í gjár legði Norrøna so leiðina út aftur av Skálafjørðinum, tá kósin varð sett móti Seyðisfjørðinum í Íslandi.

## Ábøtur

Fyrr í vetur var eisini neyðugt hjá Norrönu at leggja at við bryggju í Runavík. Ta ferðina kom hon at liggja á øðrum staði, soleiðis at hon ikki fekk lagt tað stóra portrið niður.

Hesaferð kom hon tó at liggja við sjálvan pierin, har kommunan hevur gjørt ymiskar ábøtur, so at hetta flaggskip okkara kundi leggja at her. Og sum myndir vísir, so var blikalogn í Runavíkar Havn í gjár.

Tá Norröna legði at landi gjáramorgunin beint eftir kl. 8, var hetta á ein hátt fyri at royna, sum hesar ábøturnar á rampuna vóru nøktandi.

Og, sum sagt varð av havnarskrivstovuni, so riggaði alt sum tað skuldi á hesum staði. Bæði ferðafólk, bilar og farmur sluppu lættliga í land.

Aftaná at alt var komið í land, varð beinanvegin farið undir at rigga skipið til næsta túrin, sum gekk til Íslands. Hagar legði Norröna leiðina kl. 14.

PEPSI



Ókeypis
Chicken Wings
tá tú bíleggur...

Pizza 67 bjóðar nú eisini vælumtókta, altjóða forrættin "chicken wings".
Hvørja ferð tú bíleggur av matarskrá okkara - eisini tá koyrt verður út - lata vit ein "chicken wings"-forrætt við púra ókeypis.

Tilboðið er galdandi frá mánadegnum 18. apríl til sunnudagin 24. apríl.

TEAM85

PIZZA 67

**TÓRSHAVN** · Tinghúsvegur 8
**Opið:** Mán.-frí.: 11.30-14.00 og 17.00-23.00. Ley. og sun.: 14.00-23.00
**By night:** Frí. og leygardag: 24.00 - 06.00
tel. 356767

**KLAKSVÍK** · Klaksvíksvegur 22
**Opið:** Sun.-hós.: 17.00-23.00. Frí. og ley.: 17.00-24.00.
**By night:** Frí. og leygardag: 24.00-06.00.
tel. 456767

Ókeypis heimkoyring, um keypt verður fyri meir enn kr. 100,-

Fyrivarni verður tikið fyri útseldum vørum.